

*Smæran var ein av størstu handlunum í Havn, tá ið Johan var ørindadrongur, og bar vøruna út í leypi*



*Millum tey sum arbeiddu saman við Johan í Smæruni var Hedvig, dóttir gamla Knút skómakaran. Her er hon saman við manninum Juul Olsen, ættaður úr Nólsoy*



*Hans Jacob í Smæruni (1890-1967)*

havhestasjúku.

Tá var tað ein dani, sum var skipari. Hann æt Niels og varð kallaður Niels Glasrøv. Hann var so ómetaliga sterkur, var ein rættiligur kraftkalur. Hann var eisini sera brutalur. Um man ikki tørnaði út í stundini við útpurring, tók hann í heratoppin á viðkomandi og blakaði hann út úr koyggjuni. Hetta fekk eg eisini roynt. At enda lá mann bara og lúrdi, til hann hoyrdist, og so var at sleppa sær úr koyggjuni í stundini. Hetta gjørdi, at eg fekk eitt innbygt ur. Eg havi ongantíð brúkt vekjaraklokku. Skal eg upp kl. 2 um náttina, so fari eg eisini upp uttan hóvasták.

Niels fiskaði einki serligt. Vit vóru í Íslandi. Eg skuldi vera kokkur, men tað lá einki serliga væl fyri. Eg hevði sjóverk, báturin rullaði so ónátturliga illa. Bússan og kappin vóru fremst í gronini. Tá ein kom niður var farið aftur eftir. Fyrsta túrin misti eg 14 pund og var 14 dagar burtur. Lønin var 80 kr. um mánaðin + bonus, um nakað var til avlops. Tað var ikki so galið tá í tíðini. Hinir fingu prosentir.

Vatn var lítið av. Tangin var sum ein vanlig petroleumstunna til støddar. Hann stóð á dekkinum. Hetta var vatnið, vit høvdu við fyri 14 dagar, so her var neyðugt at spara. Hetta við kokkingini gavst eg við og fór út á dekkið. Tað dámdi mær betri. Eg var við tað árið. Men lítið kom burturúr sum dekkari. Sølurnar vóru so vánaligar. Um man seldi fyri 150 sterlingpund, sum tá var 20 kr. pundið, var hetta ein vanligur túrur. Men hetta var lítið meira enn fyri útreiðslur.

Tað vóru fleiri danir við, men ein føroyingur sum eg minnist var Hans Karli við Stein. Hann var javngamal við meg, hann doyði í 2004. Hann var beiggi Polluks og tískil pápabeiggi Kára við Stein okkara tíðindamann í Grønlandi. Jógvan á Dul, sonur Agnas, var stýrimaður.

Tá landað varð í Grimsby brúktu teir ikki spæl. Tríggir mans stóðu á dekkinum og háladi fiskin upp í kurvum. Hetta gekk kortini skjótt fyri seg.

## Fór at lossa

Tá ið eg so kom heim aftur fór eg at royna at fáa ein lossikjans, og tað fekk eg. Har var eg heppin. Hetta kom nokk av tí, at eg hevði hjálpt mammu at vaska um morgnarnar, og tí kendi arbeiðsformannin.

Men hetta við lossingini var miskunnarleyst. Tað var 14. hvønn dag at lossað varð fast, og tað var tá ið Tjaldrið kom. Tað komu kanska einir 100 mans oman á kajuna í vón um at fáa arbeiði. Men teir skuldu bert brúka 15 ella 20, sum so arbeiðsformaðurin skuldi pilka úr rúgvuni. Restin mátti so til hús við ongum.

Vit skuldu eisini bunkra Tjaldrið. Tað skuldi hava 60 tons av koli hvørja ferð tað kom. Kolið varð koyrt uppí leypar í kolagarðinum hjá Skipafelagnum. Fyrst varð tað lempað uppí eina vekt, og síðan stúrtað í ein leyp. So var leypurin lyftur upp á bakið á einum manni. Síðan var gingið tvørtur um kajuna, og so upp í ein leytara. Til seinast varð kolið stúrtað í deksli til kollastina. Hetta mátti vera sera arbeiðskrevjandi.

Hetta tók tó ikki fullan dag, einar 6-8 tímar. Tað vóru 100 pund av koli í hvørjum leypi. Men leypurin sjálvur vigaði 20 pund, og var ofta ófantaligur.

So einaferð høvdu vit brúk fyri nøkrum monnum til at bunkra Tjaldrið. Tað vóru nógvir sum stillaðu seg upp. Nakrir menn vórðu úvaldir at taka ein leyp, og eg var ein teirra.

So peikaði formaðurin eisini uppá ein mann um at koma at arbeiða. Hann hevði verið við trolara, men hevði fingið ein snudd og var blivin nakað lamin. Hann haltaði nakað. Men hann var raskur kortini.

Tað vóru tveir, sum skuldu fylla. Tað vóru tvær vektir. Teir sum fyltu, skuldu skiftast um at lyfta leypin uppá teir, sum skuldu bera.

Men so einaferð varð hetta arbeiðið liðugt og nevndi maður spyr: »Hvar skal eg so fara?« »Tú skalt fara handan vegin«, og so peikaði formaðurin heim eftir kajuni. Tá stóð nógv á mær. Eg visti, at hesin var ein raskur og góður fyllari. Hann hevði tveir dreingir til fosturs og hevði tungt hús. Hann búði úti á Reyni, og umstøðurnar vóru ikki góðar. Og so bara at biðja hann fara heim aftur! Eingin tordi at siga nakað. Segði man nakað, so var viðkomandi ikki biðin aftur. Hetta vóru treytirnar hjá arbeiðarum tá í tíðini.

Vit skuldu eisini bunkra Smiril. Tað tók tveir tímar at bunkra hann. Her vóru tvey deksil. Eitt til kolið at koyra niður í og eitt til at stoyta øskuna á sjógv. Onkur koyrdi kolið í øskuholið. Spurdur hvat hann gjørdi, svaraði hann: »Jú, eitt hol og annað!«

Tað hendi ofta, at kol fór á sjógv í samband við slíka bunkring. Tá vóru tað teir, sum við eini kurv royndu at trola hetta kolið upp aftur úr sjónum, so tað kundi dríggja um heima við hús. Teir kundu fáa uppí eina kurv av koli, og hetta kundi muna væl.

Hetta var at enda forboðið, tí teir søgdu, at hetta undirmineraði kajuna. Men hvat skuldi man gera, kolið kostaði jú nógvar pengar. Summir høvdu jú ikki torv heldur. Eg plagdi at keypa kol uppí eina spann úti hjá Valdemar Lützen. Hon kostaði 25 oyra. Saman við torvi kundi hetta strekkja eina viku.

## Søgan um Elsu

Í seinasta parti greidd vit frá Magnus, beiggi Dánjal í Horni, og konu hansara Elisabeth, sum vóru foreldur Vilhelm (Tórsheim), Magnus og Evu.

Her var Sámal útigloymdur. Hann fór til Amerika í 1912. Konan Kristianna, kallað Kista, og børnini fóru seinni í 1919. Við sær hevði hon yngstu dóttir Vilhelm, Elsu, sum hon hevði tikið til sín, aftaná at mamman Petronella var deyð í 1910. Kristianna var dóttir Johan Simonsen í Hoyvík. Petronella var úr Funningi. Hon hevur stein í gamla kirkjugarði.

Petronella og Vilhelm áttu umframt Elsu, Magnhild, Miu, Magnus, Petur og Evu Margretha, sum doyði sum nýføðingur umleið 14 dagar áðrenn mamman. Sámal og Vilhelm búðu báðir í Magnus Heinasonargøtu. Elsa kom ikki aftur til Føroyar. Hon giftist og fekk børn, og ættin plagdi at fáa brøv frá henni.

**Næstu ferð**
Í komandi parti fer Johan rættuliga til skips. Hann fer við Turid hjá Zacharias Heinesen